BØRN Í FÁTÆKRAVÁÐA

»MEÐAN VIT

6 Sosialurin *Hugskot og viðmerkingar – send sms til 225000* Mánadagur 1. juli 2013 · Nr. 74

FÍGGJARLIGA SPERD

KAMPURIN VIÐ KASSA

REPORTASJA Yvirtrekk á kontuni, sparsemi og bundinskapur av familjuni. Soleiðis er gerandisdagurin hjá 32-ára gomlu kassadamuni Sólrun Durhuus, sum er stakur uppihaldari við tveimum børnum. Sosialurin hevur hitt eina av teimum 436 fíggjarliga sperdu familjunum, sum fingu hjálp frá felagsskapinum Í menniskum góður tokki í vetur

Tekstur: Dánjal Hojgaard
Myndir: Anna K. Hojgaard

Við kassa nummar 2 situr Sólrun og smilist.

Bíip-bíip, eigur kassaaggaratið.

– Soleiðis ljóðar tað dagin langan, eigur hon blíðliga, meðan hon tekur handilsvørumar og knýtir strikukotuna móti maskinuni, sum játtar prisin við sínum eykenda signali.

Hon trýstir fótin á pedalina undir borðinum, um setir flutningsbandið gangd. Tá ið mjólk, cornflakes, wc-pappir og annað er komið ligjagnum, taitar hon samlaða prisin inn.

Ein fyri og annar eftir verða kundarnir avgreiddir. Summi gjalda við korti. Onnur kontant. Stórar peningupphæddir skifta hendur. Kassin fyllist.

– Kvinnan? spyr hon brosandi.

Ein kampur

Sum kassadama í Bónushandlinum á Ódinshædd í Havn handler 32 ára gamla Sólrun Durhuus stórar peningupphæddir hvønn einarta dag. Men í sínum egna privatlivi noyðist hon at venda hvørjum eyra.

Personligu yvirskotið og gleðin við kassa 2 stendur í andsogn við fíggjarliga undirskotið og peningsligu spekulasjónirnar, sum merkja hennara egna gerandisdag.

– Tað er ein kampur, alt tað hella. Eg royni sum fraggast at fáa endarnar at rokka saman, eigur hon.

– Hóast tað ikki gongur altíð so royni eg sum fraggast, tekur hon afturí aftur.

Transportbandið rullar. Fólk fylla pusarnar. Onkur viðmerking fellur um veður og vind.

Sólrun smilist.

2.000-3.000 til taks

Sólrun hevur verið kranhakvinna hjá Bónusi tey seinastu fimm árini. Áðrenn arbeiddi hon sum kranhakvinna í Mýlnuni og Miklagarði.

Hon er tímalønt. Ársinntøkan liggur um 150000 krónur. Harumframt koma barnapengar og barnaskeyti.

Tá skattur, húsaleiga, lán og aðrar fastar útreiðslur eru dragnar frá, hevur hon millum 2000 og 3000 krónur eftir til sín og børnini um mánaðin.

Til mat, klædir og lívsins uppihald annars.

Onkuntíð mekra. Onkuntíð minni.

– Tá eg fái fullan arbeiðsmánað stendur rimligt vel til. Men høgtíðir sum jól, páskir, hvítusunna o.a.fr. kosta hjá einum tímalønum, eigur hon, tá ið hon hevur verið og hugt í lønarsedlarnar fyri teir seinastu mánaðirnar.

– Tað sæst aftur á lønarsedlinum, at tað hava verið nógvir høgtíðsdagar í vár. Onkuntíð havi eg havt minni enn 2000 krónur eftir, staðfestir hon stillisliga.

Sjúkradagar hjá henni sjálvari ella barnunum merkja eisini mista inntøku, tí sum tímalønt hevur hon ongan rætt at vera heima við løn vegna sjúku.

Serliga trupul gerst støðan, tá tær stóru rokningarnar falla til gjaldingar. Tá stendur ofta minus á kontuni, áðrenn mánaðin er blivin gamalur.

– Tá má eg so tosa við bankan um at fáa loyvt trot, so at eg klári at keypa inn. Tað er ikki óvanligt, men tey eru fitt. Tað plagar at ganga, smilist hon.

framhald ➡

» Eg gangi ikki runt og sigi at eg eri fátøk, men tað eri eg nokk, tá ið tað kemur til pengar

KASSADAMAN

32 ára Gamla Sólrun Durhuus við kassan í Bónus. Av tí at hon er tímalønt svingjar inntøkan við høgtíðsdagum og sjúkradagum og lønarkugrunnurlagið hjá henni sum einligur forsyrgjari kann tí vera rættuligur avkarlig!

Miðlahúsið og Í menniskjum góður tokki taka málið í egnar hendur

Hóskvøldið var ein heldur sigandi og syrgilig sending vísst í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum. Sendingin "Við hjálp frá góðum fólki" segði eina søgu um hvussu ójavnt er býtt í okkara samfelag. Meðan mong okkara ikki eru tilvitað um lasagna er uppá tilboð hesa vikuna, ella hvat tað kostar at melda børn okkara til fimleik, so er tað tann syrgiligi veruleikin, sum summi í okkara samfelag liva í. Og sendingin hóskvøldið vísti stakar uppihaldarar, sum hóast trong kor megna at fáa dagin og vegin nøkunlunda at hanga saman. Men Í menniskjum góður tokki veit at siga, at tey eru mong í okkara samfelag, sum ikki eiga pening til mat á borðið hvønn dag.

At tað eru fólk í okkara samfelag, sum liva undir fátækramarkinum er ikki ein nýggjur veruleiki. Vit hava samtykt eitt fátækramark, og vit hava fingið lýst júst nær ein persónur livur undir markinum og ikki. Og kortini tykist lítil politiskur vilji vera fyri at bøta um støðuna hjá teimum, sum stríðast fyri at fáa mat á borðið.

Taparin í tí ósosialu politisku kós, sum løgd er fyri dagin seinastu árini, eru børnini. Tey børn, sum uppliva, at lív teirra er munandi øðrvísi enn tað hjá floksfeløgunum, tí "mamma eigur ongar pengar". Ivaleyst kunnu vit argumentera fyri, at tað er ikki ein mannarættur, at fáa tað nýggjasta playstation ella at ferðast einaferð um árið.

Men rungandi politiska tøgnin um hendan samfelagsbólk setur okkum ein spurning. Hvar er minstamarkið fyri hvussu fólk kunnu liva í Føroyum? Nær eru vit ov fátøk og hvat er ein menniskjarættur í dagsins samfelag?

Saman við Í Menniskjum góður tokki hevur Miðlahúsið stovnað eina konto undir hjálparfelagsskapinum, har vit savna pening inn til børn, sum liva undir fátækramarkinum. Átakið "Meðan vit bíða" hevur fingið sítt heitið ásannandi, at ein løtustuðul ikki er nóg mikið, men kanska ein hjálp meðan vit bíða eftir politiska myndugleikanum. Starvsfólk í Miðlahúsinum lata í apríl mánaði ein part av sínari løn til endamálið, og vónin er, at onnur gera tað sama.

Síðani fer Í menniskjum góður tokki at býta pening-in millum tær barnafamiljur, sum hava tørv á hjálp. Allur innkomin stuðul fer óskerdur til endamálið.

Samstundis fer Sosialurin, in.fo og Rás2 at varpa ljós á børn, sum liva undir fátækramarkinum, og á vantandi politiska vilja til at taka um endan hjá hesum samfelagsbólki. Vit byrja í Sosialinum í dag við at lýsa støðuna enn einaferð - tí hetta kjakið er tíverri framvegis neyðugt.